# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# LATIÐ »PAAL KOMA AA MAAL«

Í tíðindasendingini í útvarpinum hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið varð kjakast um, hvørt tað er rætt, at útvarpsfólk nýta sína egnu dialekt í tíðindasendingunum.

Niðurstøðan var tíbetur, at sjálvandi skulu tey tað. Men útvarpið hitti eisini ein mann, sum hevði aðra hugsan. Hann »stóð av« (!!?) tá ið hann hoyrdi útvarpsmann av Eiði við síni fløtu eiðisdialekt greiða frá, at »Paal kom aa maal«. Hann skilti ikki, hvat útvarpsmaðurin við »fløtu a'unum« segði. Men hann kom sjálvur til ta niðurstøðu, at tað var kanska honum sjálvum, tað var galið við...

Vit kundu ikki verið meira ósamd við hesum manni um hesi viðurskifti. Sjálvandi skulu allar dialektir verða eins góðar í øllum almennum høpi, bæði hjá leikum og lærdum. Og tað í finasta lagi, at tíðindafólkini í útvarpinum og Rás2 nýta sítt egna nátúrliga mál til upplestur har eisini. Men alt skal sjálvandi gerast við máta. Tað er munur á at lenda og at grava seg niður - onkur útvarpsmaður hevur kanska gjørt í so nógv av, at tað argar fólk, og tá kann tað verða stravið at hoyra.

Men vit eiga at fegnast um, at vit hava so nógv brigdi av okkara móðurmáli varðveidd. Hetta er ein sjáldsamur skattur, sum uttan iva kemst av, at vit gjøgnum øldir ikki hava dugað at skrivað okkara egna mál, og tí hevur tað verið borið av mannamunni. Skriftmálið er í veruleikanum ein hóttan móti dialektum, tí eitt skriftmál einsrættar málið. Um vit bara lesa, so hvørva dialektirnar.

Tað er kanska meiri av hepni enn av tilvitan, at vit hava varðveitt ymsu brigdini av málinum. Og tað at forfedrar okkara valdu etymologiska skriftmálið hjá Hammershaimb, tá skriftmál okkara varð konstruerað má sigast at vera heppið. Um vit høvdu valt ta fonetisku leiðina, har málið verður skrivað eins og tað verður framborið, so vóru helst allar dialektir burtur í dag.

Grannar okkara fyri vestan, íslendingar, hava skrivað í øldir, og



*Elis er eyðkendur við sínum sandoyarmáli*

tað er helst orsøkin til, at Ísland ikki hevur dialektmunir á málinum, á sama hátt sum vit hava.

At gera gjøldur úr hvørjum øðrum, tað duga vit væl í Føroyum. Eisini tá tað kemur til málið. Um vit útihýsa dialektum - og serliga teimum brigdum, sum fáa okkara tosa, so verður mál okkara fátækari.

Vit hava eitt ríkt mál, sum vit skulu vera errin av. At máið er fjølbroytt, kann bara gera tað enn ríkari.

Latið tí fólk við øllum dialektum sleppa fram at allastaðni - og tað er í fínasta ordan, at eiðismaðurin letur »Paal koma aa maal«

**» Vit eiga at fegnast um ymsu bridgini í málinum**

## Bara Kringvarpið er til

***- Kringvarpið er tað einasta staðið, hvar málið verður nýtt í professiónellum høpi.***

Orðini eigur Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarpi Føroya.

Hetta segði hon í einum annars áhugaverdum og viðkomandi innslagi um, hvørt tíðindafólk í Kringvarpinum skulu sleppa at nýta sína egnu dialekt í tíðindasendingunum.

Vit í Miðlahúsinum skulu gera kringvarpsstjóran varugan við, at tað eisini eru onnur, ið nýta málið professiónelt, og at tað eru aðrar útvarpsrásir í hesum landinum, til dømis Rás2.




*Tá Annika Mittún Jacobsen varð sett sum stjóri í Kringvarpinum, visti hon ikki, hvar Miðlahúsið var*

*(Samrøða í Sosialinum 20. feb. 08)*

## Trivaligar stjóralønir

*»Øll menniskju eru líka, men summi eru meira líka, enn onnur.«* Soleiðis segði George Orwell gamli í gitnu bókini The Animal Farm.

Og rætt hevur hann. Um vit hyggja á topplistan yvir lønir á www.vinnuvitan.biz, so síggja vit, at als eingin samanhangur er millum ársúrslit hjá partafeløgunum - og lønina, sum stjórarnir fáa.

Listin høgrumegin er tikin úr skipanini hjá vinnuvitan.biz, og tølini eru fyri 2009. Allir roknskapirnir eru ikki komnir í skipanina, so listin kann broytast. Vert er eisini at hava í huga, at í summum partafeløgum eru tveir stjórar.

| | Felag | Stjóraløn kr | Ársúrslit kr |
|---|---|---|---|
| 1 | BankNordik P/f | 5.105.000 | 110.663.000 kr |
| **2** | **Eik Banki P/f** | **4.446.000** | **-297.321.000 kr** |
| **3** | **Atlantic Petroleum P/f** | **3.347.000** | **-42.072.000 kr** |
| 4 | Smyril-Line P/f | 3.011.000 | 15.827.000 kr |
| **5** | **Nema P/f** | **2.532.000** | **-11.527.000 kr** |
| 6 | Havsbrún P/f | 2.502.000 | 52.282.000 kr |
| **7** | **Atlantic Airways,P/f** | **2.257.000** | **-6.611.000 kr** |
| 8 | Magn P/f | 2.121.000 | 8,769.000 kr |
| **9** | **Norðoya Sparikassi** | **2.097.000** | **-37.986.000 kr** |
| 10 | Bygma Balslevs | 1.733.000 | 2.953.000 kr |
| 11 | Effo P/f | 1.718.000 | 14.548.000 kr |
| 12 | S.M.S. P/f | 1.679.000 | 10.000 kr |
| **13** | **Mest P/f** | **1.608.000** | **-3.982.000 kr** |
| **14** | **Postverk Føroya P/f** | **1.511.000** | **-8.017.000 kr** |
| 15 | Trygd Tryggingarfelag P/f | 1.500.000 | 24.008.000 kr |
| **16** | **Dimmalætting P/f** | **1.488.000** | **-1.888.000 kr** |
| **17** | **Formula.fo P/f** | **1.473.000** | **-2.534.000 kr** |
| 18 | Føroya Lívstrygging P/f | 1.348.000 | 15.286.000 kr |
| 19 | Tryggingarfelagið Føroyar P/f | 1.297.000 | 93.950.000 kr |
| **20** | **KJ Hydraulik P/f** | **1.274.000** | **-2.014.000 kr** |
| **21** | **Telefonverkið P/f** | **1.249.000** | **-35.064.000 kr** |
| 22 | Fiskaheilsutænastan Sp/f | 1.190.000 | 203.000 kr |
| 23 | Petur Larsen P/f í samanl. | 1.133.000 | 1.523.000 kr |
| 24 | Vónin P/f | 1.051.000 | 3.902.000 kr |
| **25** | **Skipafelagið Føroyar P/f** | **1.020.000** | **-43.163.000 kr** |



**» Impotent samgonga**

HERI MOHR
KJAK Á SÍÐU 31



**» Ágangur móti veikum**

JENS AV RANA
KJAK Á SÍÐU 31

## Sirkus fyri alla familjuna

Cirkus Baldoni byrjar sýningar sínar í Føroyum mánakvøldið kl. 19 í ítróttarhøllini í Vestmanna. Síðan verður vitjað á teimum flestu ítróttarhallum kring landið við klovnum og gyklarum.

Frá mánadegnum 30. august til mikudagin 8. september 2010 verður møguleiki at uppliva tveir tíma longu sýningina hjá Cirkus Baldoni, sum er fyri alla familjuna. Sýningarnar verða í høllum ymsastaðni í Føroyum.

Í tíðindaskrivi siga Cirkus Baldoni, at har er alt frá gyklarum við keylum til flúgvandi tallerkar á pinnum og rulluskoytuframsýning í heimsklassa.

Eisini eru klovnarnir Danilo og Danila ordiliga í hopla, eins og Mr. Hokus og Miss Fokus framføra síni gandakynstur, umframt at cowboy og indianarar hava sín leiklut á framsýningunum.

Talan er um eitt sirkus við góðum stemningi og tónleiki. Meðan framførslurnar eru, kunnu áskoðararnir hugna sær við slikkipinnum, candyfloss og øðrum góðum.

Framsýningarnar verða í Vestmanna, á Giljanesi, í Klaksvík, Runavík, Fuglafirði, Trongisvági, Tórshavn, Skopun, Eiði og í Hvannasundi.

Billettir kunnu keypast ella bíleggjast á: www.cirkusbaldoni.com ella í forhøllini ein tíma áðrenn hvørja sýning.

Til 5. september kunnu billettir keypast á Kunningarstovuni í Havn. Frá 1. til 8. september kunnu billettir eisini keypast á Kunningarstovuni í Klaksvík.






## Rás2 á odda

*QuickPoll kanningin á Portalinum hevur seinastu tíðina spurt fólk, hvørji útvarpsstøð tey hava lurtað eftir í summar. Í morgun høvdu 5.074 svarað. Úrslitið sæst vinstrumegin.*

Sosialurin

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*